FYLGISKJAL 4

Javnstøðunevndin

Samferðslumálaráðið
Tinganes
100 Tórshavn

18. desember 2018

**<u>Hoyringssvar í sambandi við uppskot um broyting í løgtingslóg um barsilsskipan</u>**

Víst verður til uppskot um leingjan av rættinum til barsilspening (Mál nr. S6800-026/18) við tveimum vikum.

Sambært almennu viðmerkingunum er eitt av høvuðsendamálunum við uppskotinum at styrkja um javnstøðuna. Skotið verður upp at oyramerkja aðra vikuna til pápan, meðan hin verður frí at deila millum mammuna og pápan.

Royndirnar frá grannalondunum vísa, at pápar einans taka tær vikur, ið eru oyramerktar teimum. Vikur, sum skulu eitast at vera fríar at deila, fella í veruleikanum til mammuna.

Tískil merkir uppskotið í praksis, at páparnir fáa 5 vikur, meðan mammurnar fáa 43 vikur. Hetta ger, at kvinnurnar vera uppaftur longri frá arbeiðsmarknaðinum, og hetta merkir, at lønarmunirnir millum kynini økjast uppaftur meiri, at menn gera uppaftur minni umsorganararbeiði, og at javnstøðan verður verri.

Børn hava rætt til bæði síni foreldur, og barsilstíðin er eitt upplagt høvi at geva foreldrum og børnum møguleika fyri eini góðari byrjan.

Javnstøðunevndin mælir tískil til at oyramerkja tær tvær eyka vikurnar til pápan, og í framtíðini at oyramerkja alla ta eyka tíð, sum møguliga verður løgd aftrat barsilstíðini, til pápan, inntil pápar fáa oyramerkt líka nógvar vikur sum mammur (í løtuni 14 vikur).

Vinarliga

Javnstøðunevndin

P.S. Vit umbera, at vit ikki hava sent viðmerkingarnar inn fyri freistina 13. desember 2018, men mugu samstundis viðmerkja, at vit ikki hava fingið nakað teldubræv ella aðra áheitan við lógaruppskotinum til ummælis, sum vit vanliga hava fingið og tað stendur, at vit skuldu fáa í viðmerkingunum til lógaruppskotið punkt 1.5.